## Búskapur og vinna:
## Dýrari bústaðir

Alt bendir á, at tað verður dýrari og dýrari at keypa sær bústað í Noregi. Ein forsøgn hjá norsku byggivinnuni sigur, at umleið 24.000 bústaðir verða bygdir um árið tey bæði næstu árini, samstundis sum kanningar vísa, at tað er neyðugt at byggja 30.000 bústaðir um árið, um prísvøksturin skal halda seg á sama støði saum tann vænt-aða inflasjónin.

Byggivinnan sigur, at ov fáir bústaðir verða bygdir, tí trot er á grundstykkjum og byggi- og býarætlanum. Harafturat verður víst á, at Húsbankin nøktar ikki eftirspurningin.

## SAS gevst

Skandinaviska flogfelagið SAS missir nógvar pengar av rutum, sum geva hall, og tí hevur felagið sett sær fyri at gevast við flúgvingini á fleiri leiðum. Samstundis er ætlanin at umskipa hina flúgvingina.

Eitt nú er ætlanin at gevast við flúgvingini í Norðurnoregi, sum felagið Widerøe skal yvirtaka, og flúgvingin millum Keypmannahavn og tríggjar smærri býir í Svøríki verður niðurløgd.

SAS hevur eisini gjørt av at gevast við flúgvingini til Syðra Streymfjørðin í Grønlandi, tí hon gevur hall. Tann rutan steðgar 1. apríl næsta ár. Grønlandsfly, sum SAS eigur 38 prosent av, flýgur eisini til Syðra Streymfjørðin.

## Verða kanska skattað

Fleiri norðmenn, sum hava keypt sær íbúðir umborð á marglætisskipinum "The World", kunnu nú vænta sær rokning frá norska skattavaldinum. Skattavaldið hevur roknað seg fram til, at teir einstøku eigararnir kunnu vænta sær rokning upp á millum 2000 og 3000 krónur um dagin ella upp í umleið eina millión krónur um árið.

Talan er bæði um inntøkuskatt og ognarskatt. Skattavaldið sigur, at tølini eru fyribilstøl, tí tey eru ikki liðug at virðismeta íbúðirnar umborð á skipinum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísraelska hersetingin er tann størsta forðingin fyri friði

**Ísraelska avgerðin at endurherseta fleiri palestinskar býir er tann størsta forðingin fyri einari vápnahvíld í Miðeystri, sigur amerikanski uttanríkisráðharrin eftir ta miseydnaðu friðarferðina**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*



*– Ísraelska hersetingin av bygdum og býum á Vestara Áarbakka er størsra forðingin fyri friði, sigur amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell*

*Mynd: Reuters*

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, var týðiliga vónsvikin, tá hann endaði friðarferð sína í Miðeystri. Tvær vikur eftir at amerikanski forsetin, George W. Bush, hevði kravt ísraelska afturtøku, mátti Colin Powell, ásanna, at ísraelsku hermenninir framvegis eru í teimum palestinsku býunum, og at teir hava hersett fleiri bygdir og býir síðani.

- Hetta er tann størsta forðingin fyri, at tað ber ikki til at fáa vápnahvíld millum partarnar, segði amerikanski uttanríkisráðharrin.

Ímeðan geva ísraelsmenn og palestinar hvør øðrum skyldina av, at einki kom burtur úr ferðini hjá Colin Powell. Palestinski samráðingarleiðarin, Saeb Eerekat, segði í gjár, at ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevði gjørt alt fyri at forða fyri, at Powell skuldi fáa nakað burturúr.

Ráðgevin hjá Sharon, Dore Gold, segði mikukvøldið, at ísraelsmenn vóru til reiðar, men at palestinski leiðarin, Yasser Arafat, hevði einki tilboð um vápnahvíld.

# Ísland kanska ES-búgvið longu næsta ár

**Ongar tekniskar forðingar eru fyri, at Ísland kann søkja um limaskap í ES**

ÍSLAND OG ES
*Árni Joensen*

Seinastu tíðina hevur nógv verið gjørt burturúr, at ein stórur meiriluti av íslendingum er fyri, at Ísland skal taka upp samráðingar við ES um limaskap. Hetta hevur serliga vakt ans í Noregi, og nógvir norskir politikarar hava gjørt greitt, at fer Ísland at søkja um limaskap, eigur Noreg at gera tað sama beinanvegin, so londini kunnu samráðast samstundis. Norsku politikararnir siga, at tað er betri at samráðast saman við íslendingum enn at hava íslendingar sum mótpart seinni.

Íslendski forsætisráðharrin, Davið Oddsson, er ímóti íslendskum ES-limaskapi, og tað sama er norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik. Dávið Oddson hevur sagt, at íslendskur limaskapur kemur neyvan upp á tal fyrr enn umleið 2010, og tí hevur norski forsætisráðharrin roynt at sissa hinar norsku politikararnar og at vissa teir um, at norðmenn hava góða tíð.

### Ongar forðingar

Men forkvinnan í tingbólkinum hjá íslendska javnaðarflokkinum, Bryndis Hløðvarsdóttir, heldur ikki, at íslendskur ES-limaskapur er so fjarur, sum forsætisráðharrin vil gera hann til.

- Tað eru ongar tekniskar forðingar fyri, at Ísland kann søkja um limaskap, og at tær neyðugu broytingarnar í grundlógini síðani verða framdar eftir stuttari tíð. Er politiski viljin til tess, kann hetta gerast aftan á altingsvalið í mai næsta ár, og so kann grundlógin broytast, tá tað nývalda Altingið kemur saman næsta heyst, segði íslendski andstøðuleiðarin við norska blaðið Aftenposten í gjár.

Hon ávarar norðmenn ímóti at halda, at nakrar formligar forðingar eru fyri einari skjótari ES-tilgongd í Íslandi.

- Tað eru veljararnir, sum avgera, hvussu farast skal fram. Metingarnar hjá forsætisráðharranum vísa bara hansara tvørrandi vilja í ES-málinum, sigur Bryndis Hløðvarsdóttir.

Norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, hevur víst á, at skal íslendska grundlógin broytast, skal broytingin samtykkjast tvær ferðir við einum altingsvali ímillum, og at tað fer at taka rúma tíð. Forkvinnan í tingbólkinum hjá íslendska javnaðarflokkinum vísir í hesum sambandi á, at í Íslandi kann tingið upploysa seg sjálvt, og tí er einki ávíst mark fyri, hvussu langa tíð ein slík lógarbrotying tekur.

Norska Stórtingið skal harafturímóti sita alt valskeiðið.

## Úr Norðurlondum:
## Í skúla við hús

Í Noregi vísir ein nýggj kanning, at talið á børnum, sum ganga í skúla heima við hús, er nógv størri, at almennu skúla myndugleikarnir siga. Kanningin vísir, at 385 børn fáa frálæru í heiminum, og tað er tríggjar ferðir so nógv, sum talið hjá myndugleikunum er.

Á lærda háskúlanum í Oslo, sum hevur gjørt kanningina, halda tey, at tann stóri munurin stendst av, at skrásetingin hjá myndugleikunum er ikki nóg góð, men ein orsøk er ivaleyst eisini, at almennu skúlamyndugleikarnir hava lítlan áhuga í at nema við evnið, siga tey. Norsk bløð skriva, at síðani ein skipan við heimafrálæru kom í gildi fyri níggju árum síðani, eru tað alt fleiri og fleiri børn, sum velja at ganga í skúla við hús.

## Alt ov nógv

Stýrið fyri teimum donsku dómhúsunum hevur nú boðað stjórnini frá, at tað ber ikki til at taka av tey 480 skrivstovustørvini, sum stjórnin ætlar at spara burtur innan dómsvaldið næstu fimm árini. Stýrið sigur seg hava roknað seg fram til, at umleið 100 størv kunnu takast av.

Stýrið fyri dómhúsunum sigur, at ætlar stjórnin at taka meiri enn umleið100 størv av, fer tað at darva einari tí, sum stýrið kallar eina rímiliga menning í teimum donsku dómstólunum.

## Vænta ófrið

Felagsskapir, sum ætla sær at skipa fyri mótmælistiltøkum í sambandi við fundin hjá Heimsbankanum í Oslo í juni mánað, eru ósamdir um framferðina. Á einum fundi í vikuni skutu nakrir av felagsskapunum upp, at tiltøkini skulu vera friðarlig, men ein triðingur av umboðunum vildi ikki taka undir við tí. Løgreglan í Oslo ber tí ótta fyri ófriði í sambandi við fundin.

Upprunaliga skuldi Heimsbankin halda fundin í Stockholm, men tá svenska løgreglan helt seg hava fingið nóg mikið av ófriðinum undir ES-fundinum í Gøteborg, valdi bankin at flyta fundin til Oslo.



# Eitt fólk – ikki statur

**Danski forsætisráðharrin stendur ikki til at vika í sínari áskoðan um Føroyar. Tað ger Tórbjørn Jacobsen heldur ikki, og mikudagin brustu teir báðir enn einaferð saman í Fólkatinginum. Líka ósamdir sum hinar ferðirnar, teir hava verið í hólmgongu í fólkatingssalinum.**

FYRISPURNINGUR
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Hóast Tórbjørn Jacobsen hevði boðað frá, at uttanumtosið nú skuldi fáa ein enda, so hava orðini hjá danska forsætisráðharranum neyvan ljóðað sum annað enn júst hetta í oyrunum á føroyska fólkatingsmanninum.

Teir báðir brustu enn einaferð saman í fólkatingssalinum mikudagin, og eins og hinar ferðirnar, forsætisráðharrin hevur svarað fyrispurningum frá Tórbjørn Jacobsen, kom ósemjan teirra millum týðiliga til sjóndar.

Teir eru ikki samdir um støðu Føroya, og tað letur til, at sama hvussu nógvar fyrispurningar, Tórbjørn Jacobsen setur, so koma teir ikki nærri einari semju.

Tórbjørn Jacobsen vildi hava forsætisráðharran at viðurkenna, at føroyska fólkið sambært fólkarættinum er ein tjóð, eitt fólkarættarligt subjekt, og at føroyska fólkið hevur sjálvsavgerðarrætt samsvarandi fólkarættinum.

Landsstýrið og undanfarna stjórnin vóru alt annað enn samd um hesar spurningar, og Tórbjørn Jacobsen segði seg hava varhugan av, at nýggja stjórnin hevur somu støðu sum stjórnin hjá Poul Nyrup Rasmussen. Hann vildi tí hava eitt greitt svar uttan uttanumtos frá danska forsætisráðharranum um hesar spurningar.

### Sama svar sum áður

Standardsvarið hjá undanfarnu stjórnini var, at avgerðin um fullveldi liggur í Føroyum, og kemur ein umbøn um hetta úr Føroyum, so verður hon eftirlíkað í Danmark. Sama svar var aftur at hoyra í fólkatingssalinum mikudagin. Anders Fogh Rasmussen kundi ikki viðurkenna tað, sum Tórbjørn Jacobsen vildi hava hann at viðurkenna.

– Nýggja stjórnin hevur júst somu støðu sum undanfarna stjórnin. Nevniliga, at stjórnin og Fólkatingið fara at virða eitt ynski frá føroyska fólkinum um fullveldi, um eitt sovorði ynski kemur. Tí kann eg ikki geva Tórbjørn Jacobsen ta váttan, sum hann vil hava, segði Anders Fogh Rasmussen.

– Tað er púra greitt, at Føroyar eru ikki ein statur, og líka greitt er tað, at føroyska fólkið er eitt fólk. Alt hetta kunnu vit síggja í heimastýrislógini, og tað er hana, stjórnin heldur seg til, segði forsætisráðharrin, sum vísti á, at orðið ”tjóð” ongan greiðan rættarliga týdning hevur, og at fólkarætturin brúkar orð sum ”statur” og ”fólk”.

Ikki færri enn tríggjar ferðir endurtók Tórbjørn Jacobsen spurningarnar hjá sær, og triðju ferðina setti hann seg sjónliga ónøgdur niðuraftur í stólin hjá sær.

– Tað er ikki danska Fólkatingið, sum skal sita við rættinum til at gera av, um Føroyar skulu vera ein statur ella ei. Hesin rætturin liggur eina og aleina hjá føroyska fólkinum. Eg endurtaki spurningarnar einaferð enn, tí eg haldi, at føroyska fólkið hevur krav uppá svar, segði Tórbjørn Jacobsen.



*Tórbjørn Jacobsen roynir at skuggaboksa móti einum ósjónligum fígginda, heldur danski forsætisráðharrin, sum mikudagin var í enn einari hólmgongu við føroyska fólkatingsmannin.*

### Skuggaboksing

Men forsætisráðharrin kundi bert geva sama svar, sum hann fleiri ferðir var komin við. At tað ikki er danska stjórnin, sum forðar fyri, at Føroyar fáa fullveldi.

– Kemur ein tílík umbørn úr Føroyum, so verður tað so. Tí havi eg eitt sindur ilt við at skilja, hvat Tórbjørn Jacobsen heldur vera trupulleikin, segði Anders Fogh Rasmussen, sum helt framferðina hjá Tórbjørn Jacobsen minna um skuggaboksing.

– Tórbjørn Jacobsen kann gott halda, at Føroyar, føroyska løgtingið, føroyska fólkið stendur yvir donsku grundlógina, men tað er og verður eitt rættiliga teoretiskt kjak. Tað hevur í veruleikanum ongan týdning, tí ein breiður meiriluti í Fólkatinginum og skiftandi danskar stjórnir hava staðfest, at kemur eitt ynski frá føroyskari síðu um fullveldi, so fáa føroyingar tað.

– Tórbjørn Jacobsen roynir tí at halda lív í einum teoretiskum kjaki, og hetta er skuggaboksing móti einum ósjónligum fígginda, segði forsætisráðharrin, sum fekk seinasta orðið í hesari hólmgonguni teirra millum.


